*– heilt og reint*

# Bókhaldari til IRF

IRF søkir við hesum eftir bókhaldara at byrja mikudagin 2. januar 2008, ella skjótast tilber.

Bókhaldarin hevur beinleiðis tilvísing til fíggjarleiðaran.

Talan er um eitt fulltíðarstarv, sum m.a. fevnir um:

- dagligt bókhalds- og roknskapararbeiði
- at umsita og avstemma ognara- og skuldarabókhald
- vanligt skrivstovuarbeiði

Allar skrásetingar verða dagliga førdar á teldu, og tí er neyðugt, at umsøkjarin hevur kunnleika til skrivi-, rokni-, og telduarbeiði. Kunnleiki til Microsoft Navision Axapta er ein fyrimunur.

Arbeiðið er sjálvstøðugt og fjølbroytt, hevur nógvar persónligar menningarmøguleikar, eins og tað setur krøv til góð samstarvsevni, menniskjaligan og fakligan førleika. Alt hetta í einum góðum arbeiðsumhvørvi.

Hevur tú hollar royndir innan bókhaldsyrkið og ástøðiliga útbúgving, ert tú møguliga tann, vit søkja.

Lønin verður sett eftir avtalu við avvarandi fakfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til IRF tlf. 414243, Erik Lervig.

Skrivlig umsókn, saman við prógvum og møguligum viðmælum, skal sendast til IRF, Postboks 39, FO-520 Leirvík, og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 28. desember 2007.

**IRF**
Postboks 39
Fo-520 Leirvík

# Uppstilling til formansval í Starvsmannafelagnum

Sambært §9 í lógum felagsins verður boðað til uppstilling til formansval í Starvsmannafelagnum.

Fastur formaður skal veljast fyri 4 ár á aðalfundi felagsins 8. mars 2008. Uppstillingin skal verða liðug innan 15. januar 2008.

Uppstillað verður á tann hátt, at boðað verður skrivstovu felagsins skrivliga frá, at limur sjálvur ynskir at stilla upp, ella at limur ella limir ynskja at stilla annan lim upp. Stillar limur ella stilla limir annan lim upp enn seg sjálvan, skal samtykki valevnisins fylgja við uppstillingarfráboðanini.

Tann skrivliga frásøgnin um uppstilling skal verða skrivstovu felagsins í hendi ikki seinni enn 15. januar 2008. Í frásøgnini skal verða tilskilað navn og bústaður hjá valevninum, og hvar valevni arbeiðir.

Formansstarvið er lønt, og bert tann, sum tekur starvið upp sum fulltíðarstarv burturav, kann verða valdur. Sambært sáttmálan hevur tann, sum verður vald/ur til formann í felagnum rætt til at fáa farloyvi frá arbeiðsplássinum alla formanstíðina, soleiðis at stovnurin hevur skyldu til at hava starv til hana/hansara, tá formanstíðin er úti.

Aðalfundurin velur formannin beinleiðis við vanligum meiriluta.

Limir verða, í seinasta lagi tá aðalfundurin verður lýstur, kunnaðir um, hvørji formansvalevni verða at velja ímillum á aðalfundinum.

Víst verður annars sum heild til § 9 í felagslógini.

Fráboðanir um uppstilling verða at senda til

**Starvsmannafelagið**
J.H. Schrøtersgøta 9
Postboks 165
110 Tórshavn

Lýsing eftir

# pedagogi til Vípuna

Sjálvsognarstovnurin Vípan søkir eftir 2 pedagogum 30 tímar, 1 pedagogi 32 tímar og 1 hjálparfólkið 25 tímar, at byrja 1. febuar 2008, ella eftir nærri avtalu.

Vípan er ein integreraður stovnur við børnum í aldrinum frá 2-8 ár. Ein stova í aldrinum 2-5 ár og ein stova í aldrinum 6-8 ár.

Arbeiðstíðinar eru skiftandi, frá 7.30-17.00.

**Vit bjóða eitt áhugavert starv:**

- hvar náttúran hevur stóran leiklut í gerandisdegnum og hvar spæl fyllir nógv
- hvar virðing og trivnaður hjá barninum er í hásætið
- við opinleika og ein jaligum hugburðið
- við broytingum hvar tú hevur tína ávirkan
- hvar vit eru byrjaði at arbeiða við "Den integrerende baggrund"

**Vit vænta av tær:**

- At tú ert útbúgvin pedagogur/hevur royndir og fagliga vitan
- At tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- At tú ert opin fyri broytingum
- At tú hevur góð samstarvsevnir yvir fyri børnum, foreldrum og starvsfelagum
- At tú sært fyrimunir fram um vansar

Um pedagogur ikki søkjur, verður hjálparfólk sett í starvið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Eyð Skúvadal, leiðara á tlf 317535/ 287535

Umsókn saman við avriti av prógvum og viðmælum, skal vera stovninum í hendi, seinasta lagi 27.07. 2007

**Vípan**
Vípuvegur 3 · 100 Tórshavn
Tlf. 317535 / 287535
bg-vipan@post.olivant.fo

# Interior

v/G. Gunnbjørgsdóttir - Innanduraarkitektur

Ráðgeving innan innrætting.
Íblástur til persónligan stíl.
Vegleiðing til rætta tilfarið.
Hugskot til perfekta rúmið.
Lítil sum stór tilboð verða givin til privat hús, handlar, skúlar, matstovur o.m.a.

tel. 258543

*Gunnbjørg Gunnbjørgsdottir*



## Stríðist tú við vektina?

Ring til mín, eg havi eitt sunt og effektivt "hjálpimiddel".

**Jana 51 71 00 / 31 88 19**
**lr@kallnet.fo**
**www.lr.fo**




> Telefonráðgeving > Anonymitet
> Tagnarskyldu > Stundir at lurta

Bláí Krossur
www.blakross.fo